Gjaldstovan fer at trola eftir skuldarum við smærri meskum

Føroya Gjaldstova hevur við nýggju DEMM-skipanini samskipað sínar mongu uppgávur soleiðis, at hon verður betur før fyri at skráseta øll týdningarmikil viðurskifti hjá skuldarum. Við DEMM verður truplari at renna undan skuld og lættari hjá Føroya Gjaldstovu at mótrokna skuld í almennum útgjaldingum.

UNI ARGE

Hon eitur DEMM.

Bókstavirnir standa fyri Debitor-, Eftirstøðu-, Mótrokningar- og Málsviðgerðarskra.

Tað ljóðar knortlut, men endamálið við skipanini er einfalt.

Nú skal landsins bókhaldari og innkrevjari geraast betur førur fyri at røkja sína týdningarmiklu uppgávu, tí higartil hevur hann havt alt ov lítla slagkraft.

Skuldarar eru slopnir undan at gjalda, tí stovnurin hevur ikki havt amboð til at krevja teir eftir pengunum, og úrslitið hevur verið, at færri pengar eru komnir í kassan, enn tað áttu.

Hálv milliard

Í dag hevur Føroya Gjaldstova 50.000 krøv liggjandi um tilsamans eina hálva milliard hjá 9 100 skuldarum.

Einar 350-400 millionir av hesi hálvu milliard koma neyvan nakrantið inn, tí talan er um skuld hjá virkjum, sum eru farin á húsagang, skatt, sum fólk uttanlands ikki hava goldið, og rentu av somu pengum.

Leif Abrahamsen, stjóri á Føroya Gjaldstovu, orðar seg soleiðis, at hetta eru viðbisleysir pengar.

– Vit hava ongan kjans at fáa teir inn, men við DEMM-skipanini skal forðast fyri, at so nógvir skuldarar nakrantið aftur skulu kunnu skylda so nógv í senn.

Betri eftirlit

DEMM-skipanin fer at hava við sær, at Føroya Gjaldstova fer at siggja á einum stað alt tað, sum virkir og einstaklingar skylda landskassanum. Hon fer eftir ætlan eisini at fáa eitt tættari samband við borgararnar.

Innkrevjingin verður effektiv.

Fyrst verða rykkjarar sendir út, um skuldin ikki er goldin rætttstundis. Verður framvegis ikki goldið, fær skuldarin boð um at møta á Gjaldstovuni, og møtir hann ikki upp, fær hann vitjan av pantifútanum.

– Sum er, er líkasælan hjá nógvum skuldarum alt ov stór. DEMM skal syrgja fyri, at líkasælan fæst burtur í einum góðum anda millum okkum og viðskiftafólkini, sigur Leif Abrahamsen.

Øll eiga at gjalda

Leiðslan á Føroya Gjaldstovuni kunnaði friggjadagin starvsfólkini á stovninum og aðrar relevantar stovnar um DEMM.

Á fundinum hevði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður við figgjarmálum, orðið.

Hann segði, at tað er alneyðugt, at innkrevjingin í føroyska samfelagnum fæst at virka betur.

– Tað hevur fyrr verið soleiðis, at stórir skuldarar eru slopnir upp í eitt nú almenn arbeiðir. Hetta verður ikki møguligt meir, og tað er at fegnast um, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann helt tað vera umráðandi at fáa eina innkrevjingarskipan, sum er rættvís og virðir borgararnar, men sum samstundis uppdregur teir til at skilja, at øll eiga at gjalda, sum skylda.

Landsstýrið hevur á figgjarlógini sett 3,5 millionir krónur av til DEMM-skipanina, sum longu er farin at virka.

Við nýggju DEMM-skipanini verður truplari at sleppa undan at gjalda skuld, tí Føroya Gjaldstova fer at hava yvirlit yvir alla skuld hjá einstaklingum og virkjum. Afturfyri verður málsviðgerðin betri

Mærsk Contractors skal bora í Lopra

Dansk Olie og Naturgas, ið leiðir boriprojektið í Lopra, hevur gjørt sáttmála við Mærsk Contractors um sjálva boringina.

UNI ARGE

Dansk Olie og Naturgas (DONG) hevur í fyrsta umfari gjørt fýra sáttmálar í sambandi við boringina, ið ætlandi byrjar í mai.

Tann størsti sáttmálin er gjørdur við Mærsk Contractors, sum fer at koma til Føroya við boriútgerð og serkønari manning. Mærsk fekk arbeiðið í kapping við fýra onnur felóg.

Triggir smærri sátmálar eru gjørdir við eitt sveitsiskt, eitt norskt og eitt føroyskt felag.

Sveitsiska felagið Hydril S. A. fekk í kapping við fýra felóg arbeiðið at levera eitt langt rør, ið skal tryggja sjálvt holið ímóti møguligum trýsti.

Norska felagið Cooper Oil Tools fekk í kapping við tvey felóg uppgávuna at levera útgerð, sum skal stýra trygdini uppi við sjálvt opið.

Og Landsbyggifelagið skal forprojektera boriøkið og gera tvær umhvørviskanningar á staðnum, ið skulu vísa, um dálking stendst av arbeiðinum. Tvey felóg buðu upp á hetta arbeiðið.

Fleiri sáttmálar

DONG fer í næstum at gera fleiri aðrar sáttmálar við felóg. Arne Rosenkrands Larsen, projektleiðari, sigur, at hetta verða smærri sáttmálar í sambandi við eitt nú flutning av útgerð til og í Føroyum, kanningar av gróti og asfaltering á økinum.

Hann væntar, at føroysk felóg fara at hava góðan møguleika at blanda seg upp í kappingina um flutnings- og asfalteringsarbeiðini.

Flestu uppgávurnar eru annars av slíkum slag, at hvørki dansk ella føroysk felóg kunnu taka tær upp á seg. Tí væntar DONG, at meginparturin av sáttmálunum, ið eftir eru, verða gjørdir við serkøn felóg úti í heimi.

Mærsk besta tilboðið

Arne Rosenkrands Larsen leggur doyin á, at onki illgrunasamt er farið fram, nú Mærsk Contractors slapp at bora í Lopra.

– Tað kann vera, at okkurt fjart samanfall av persónum er hjá Danop og við AP Møller. Men tilboðið, sum Mærsk Contractors gav, var altso tað besta, og tí fekk felagið arbeiðið, sigur projektleiðarin hjá DONG.

Í nevndini í Danop, dóttur felagnum hjá DONG, sum fyrisitur boringina í Lopra, situr Henning Kruse, ið hevur starvast hjá AP Møller í 20 ár, og sum gjøgnum felag sítt í Esbjerg er undirleverandørur hjá AP Møller í Norðsjónum.

– Ongin hevur ávirkað DONG í sambandi við boriarbeiðið. Tað skal standa pura fast, sigur Rosenkrands Larsen.

Í mai mánaði fer Mærsk Contractors ætlandi undir boringina í Lopra

Sámal Petur í Grund: Ber ikki til politiskt at stýra drykkimentan

Landsstýrismaðurin við rúsdrekkamálum Sámal Petur í Grund ætlar sær ikki at taka serlig stig fyri at fáa føroyingar at drekka lutfalsliga meira vín.

NICLAS JOHANNESEN

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við rúsdrekkamálum, ætlar sær ikki at taka nøkur serlig politisk stig í kjalarvørrinum á, at Dimmalætting hevur skrivað um stóra kanning, ið vísir, at trý til fimm gløs av vini um dagin er sunt.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann trýr lítið upp á sovorðnar kanningar. Hann vísir til eina amerikanska kanning av roykjarum og lungakrabba.

Víst so: Kanningin vísti, at fleiri roykjarar doyðu av lungakrabba. Men trupulleikin var bara, at alt í alt vóru tað fleiri, sum doyðu í ikki-roykjara-bólkinum.

Og tað er jú í síðsta enda tað, sum telur.

Sambært Sámal Petur í Grund merkir hetta, at tú ikki kanst hyggja isoleraðan eftir, hvussu sunt vín er. Tað kann vera, tað er gott fyri blóðrenslið, víst so, sigur hann. Men kanska teir óhepnu virkningarnir siggjast aftur aðrastaðni.

Hann vísir eisini til, at føroyingar, sum drekka sera lítið av vini í mun til Frakland, kortini hava líka høgan miðalaldur sum fraklendingar.

Drykkimentan

Landsstýrismaðurin við rúsdrekkamálum sigur, at føroyski prispolitikkurin er soleiðis háttaður, at drykkir við minst alkoholi, eru lutfalsliga bíligast at keypa.

Hann trýr ikki upp á, at landsstýrið, við at seta prisirnar á vini niður, fer at fáa føroyingar at drekka meira av vini aftur við matinum.

Føroysk drykkimentan er veitslukend. Og hetta trýr landsstýrismaðurin í rúsdrekkamálum ikki kann broytast, bert tí landsstýrið setur prisin á vini niður.

Rúsdrekkalógin er annars júst nú til viðgerðar í løgtinginum.

Sjálvur ivast Sámal Petur í Grund tó onga løtu í, hvat er best at drekka fyri føroyingar.

– Mjólk er gott. Men vatn er best.

Sigur avhaldsmaðurin úr Søldafirði.

Striltið at fáa semju um sildina

Kaj Mortensen, fiskivinnustjóri, og hini umboðini fyri strandalondini í Norðuratlantshavi komu ikki til nakra niðurstøðu í sambandi við fundin í London. Kongafiskurin í Irmingarhavinum og Norðhavssildin vóru á skránni, men einki ítøkiligt kom burturúr.

DIA MIDJORD

– Í veruleikanum er talan um sama fundin, sum londini royna at toyggja longur og longur, sigur Ivan Johannesen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

– Tað vísir seg, at sjálvt samráðingarklimaið kanska er eitt sindur frægari, men londini vilja fegin halda fast um sítt egna viðvikjandi sildini. Tískil er spurningurin, um vit yvirhøvur koma viðari, sigur hann.

Arligi fundurin í felagsskapinum NEAFC verður um fjúrtan dagar.

Fínst ein semja, so sleppa strandalondini Ísland, Noregi, Russland og Føroyar at fiska á økinum hjá hvørjum øðrum. Fínst eingin loysn, so fara londini at fiska hvørt í sínum lagi.

– Tað er torført hjá norðmonnum at sláka, tí teir hava longu bytt út sildina til skipini, sigur Ivan Johannesen.

Føroyar og Ísland hava gjørt sína millum kvotu, meðan Russland hevur gjørt avtalu við norðmenn, at teir kunnu fiska 120.000 tons í norskum sjógvi.

Hvat um eingin semja kemur í lag.

– So fiska øll í sínum lag, og vit fiska okkara 86.000 tons av Norðhavssildini, sigur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum.

Fólkaflokkurin: Lániavtalur og oljusáttmálar uppsigast

Í yvirlýsing frá landsfundinum leygardagin mælir Fólkaflokkurin m.a. til, at galdandi lániavtalur við Danmark skulu uppsigast, og at gjørdir sáttmálar við útlendsk felóg í sambandi við boringina í Lopra verða settir úr gildi.

UNI ARGE

Til tess at venda gongdini í føroyska samfelagnum heitir landsfundurin hjá Fólkaflokkurin á løgting og landsstýri um at kúvenda á fleiri økjum.

Lániavtalurnar við Danmark skulu uppsigast, og ein partur av blokkstuðlinum skal brúkast til at keypa Føroyar burtur úr vaksandi milliarda skuldini, sum føroyingar við verandi politisku kós ongantið verða leysir av, sigur flokkurin.

Hann mælir eisini til at siga upp verandi sáttmálar við útlendsku felógini í ætlaðu boringini í Lopra og í staðin skipa eitt samtak millum føroyskar stovnar og felóg, sum skal standa fyri allari boring uppi á landi, eins og gjørt varð í Vestmanna og Lopra í áttatiárunum.

Skattur og fiskur

Í triðja lagi mælir fólkaflokkurin til at sleppa verandi skatta- og figgjarpolitikki og í staðin lækka meðal og marginala skattatrýstið, so kostnaðarstøðið kann lækka og kappingarføriðið batna tí gagns fyri allar føroyingar.

Og í fjórða lagi mælir flokkurin til, at landsstýrið leggur nýggja fiskiveiðitilmælið hjá Skipanarnevndini niðan í løgtingið, so verandi kvotulóg ikki verður atvold til, at allur flotin verður lagdur orsakað av, at fiskastovnarnir eru so væl fyri og fiskiskapurin so góður.

Bankakanningin byrjar í dag

Fyrstu vitnini í bankakanningini verða avhoyrd í býrættinum í Keypmannahavn í dag.

UNI ARGE

Nú tjøldrini koma til Føroya úr suðurlondum, eru nakrir av fremstu politikarunum í Føroyum farnir til Danmarkar, har teir skulu avhoyrast í málinum um partabrævaumbýtið í gamla Føroya Banka.

Teir fjúrtan innkallaðu føroyingarnir eru kortini ikki allir farnir avstað í senn.

Kanningarnevndin hevur skipað avhoyringarnar av føroysku vitnunum soleiðis, at tær verða í sjey umførum hvønn týsdag og hósdag í hesum mánaðinum.

Í dag verða tey bæði fyrstu vitnini so avhoyrd, og tað verður Ebbe Mogensen, sakførari, sum saman við limum í kanningarnevndini fer at spyrja. Avhoyringarnar byrja hvønn dag klokkan 9.30 og vara væntandi til kl. 17.00.

Føroysku vitnini hava sakførarar sum hjásitarar undir avhoyringunum, og tey hava eisini havt høvi til at fyrireika seg til spurningarnar.

Føroysku eygleiðararnir í kanningini eru eisini til staðar í býrættinum. Teir eru Bjarni Djurholm fyri andstøðuna, Helena Dam á Neystabø fyri samgonguni og Leivur Harryson sum serkønur.